

## Gistingarhús nýggja í nevnd

Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya hevði ársaðalfund fríggjadagin 19. desember. Fyri vali stóðu Kjartan Dalsgaard og Kári Hentze. Haraftrat tók Leif Sørensen seg úr nevndini. Kári Hentze stillaði uppaftur og varð afturvaldur. Fyri Leif Sørensen varð Svend Åge Ellefsen valdur og fyri Kjartan Dalsgaard varð Jóhanna Rasmussen vald. Í nevndini sita umframt omanfyri nevndu Ása Johnsdóttir og Eirik Suni Danielsen. Nevndin skipaði seg eftir aðalfundin við Ásu Johnsdóttir sum formanni og Eirik Suna Danielsen sum næstformanni.



*Kunnleikin innan bjálving er komin langan veg, síðani rockwool á fyrsta sinni var nýtt í føroyskari húsabygging. Her vísir Jan á Argjum nýggjasta og mest orkusparandi háttin at bjálva eini hús*

# Varpa ljós á orkutap

**Havnar Timburhandil hevur útvegað sær eitt termografiskt tól sum vísir, hvar hitin hvørvur í húsunum. – Ætlanin er at seta fokus á orkutap í húsum, og vit eru eisini til reiðar at geva ráð um, hvussu bøtt verður um hetta, sigur Jan á Argjum, sølustjóri**

ORKUTAP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Fyri lítlum ári síðani setti Suðuroyar Sparikassi sjóneykuna á orkutap í sethúsum, og saman við arkitektafyritøku bjóðaðu teir sær til at finna fram til loysnir, hvussu sleppast kann undan orkutapi í húsunum.

Suðuroyar Sparikassi bjóðaði og bjóðar framvegis kundum sínum lagalig lán at bøta um orkutap í húsunum og harvið at minka um $CO_2$ útlátið.

Nú hevur so Havnar Timburhandil tikið táttin upp, og hevur útvegað sær eitt termografiskt tól, sum nágreiniliga mátar, hvar orkan ella hitin hvørvur úr húsunum.

- Vit bjóða okkum fram at koma út til fólk at máta hitamunin í húsunum. Við hesum tólinum kunnu vit síggja, hvar hitin hvørvur út úr húsunum, sigur Jan á Argjum.

Í sambandi við hesa orku herferðina, sum var fyrr í heyst, hevði Havnar Timburhandil eina framsýning í 2X3 hølunum á Hálsi, har teir vístu fram dømi um, hvussu farast skal fram, tá bygt verður, fyri at fáa størst møguligt gagn av tí hita, ið eini hús nú einaferð nýta.

Nógv hevur verið tosað um orkunýtslu og $CO_2$ útlát seinastu árini og ikki minst nú, tá stóra veðurlagsráðstevnan í Keypmannahavn júst er endað. Semja varð gjørd millum allar flokkar á tingi um eitt felags uppskot um framtíðar veðurlagspolitikk, sum Annika Olsen, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, hevði við sær til altjóða veðurlagsráðstevnuna fyrr í mánaðinum, sum tó ikki endaði sum vónað.

Enn er eingin útførdur almennur politikkur á orkuspariøkinum, men tað eru nógvir privatpersónar, ið sjálvir hava tikið stig til orkusparandi tiltøk í formi av til dømis privatum vindmyllum ella sólfangarum.

### Stórur áhugi

Herferðin, ið Havnar Timburhandil skipaði fyri fyrr í heyst, fekk rættiliga stóra undirtøku, og teir eru rættiliga ovfarnir um stóra áhugan, ið fólk hava víst hesum tiltaki.

- Vit høvdu vitjan av haldi eg øllum flokkunum, sum ganga á Tekniska skúla, og hartil høvdu vit hópin av vanligum fólki inni á gólvinum. Ikki bara mannfólk eru áhugað í at vita meira um orkutap, men eisini konufólk sýndu tiltakinum stóran áhuga, sigur Jan á Argjum.

Hann sigur, at teir roknaðu við áhuga frá timburmonnum og byggiáhugaðum annars, men tað hava verið hópurin av vanligum fólki, harímullum nógvar kvinnur, inni á gólvinum at fregnast.

- Vit vóru eisini úti og gjørdu mátingar av húsum fyri at síggja, hvar orkutapið var, sigur Jan á Argjum.

Endamálið er greitt at seta fokus á bjálving, ella kanska heldur vantandi bjálving.

- Vit búgva øll í húsum, sum brúka meiri ella minni olju at hita við, og flestu okkara halda uttan iva, at vit brúka ov nógv. Samstundis er greitt, at hitin hvørvur onkunstaðni, tí í støðum eru húsini ov ótætt, og tað vit bjóða er, at vísa fólki hvar tað er, at hitin sivar út, sigur Jan á Argjum.